# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Skipanin við virðislønum er okkum øllum til sóma og vísir, at vit hóast nógvar atfinningar royna at stuðla og virðismeta mentanarligt og listarligt arbeiði. Landsmyndugleikar eru eisini komnir við og nú áttu tær stóru kommunurnar eisini at sett á stovn mentanar- og listavirðislønir. Hetta vildi lyft okkum øll og hetta vildi verið eitt handartak til listafólkini.* ODDAGREININ

## Vælkosin virðislønarevni

Í síðstu viku vórðu M. A. Jacobsens virðislønirnar handaðar, og vit kunnu staðfesta, at kjørnevndirnar hava verið hepnari við sínum valum. Ikki tí valkostirnir hava verið bæði nógvir og góðir. Endin gjørdist, at Carl Johan Jensen fekk virðisløn fyri fagrar bókmentir, Guðrun Gaard fyri yrkisbókmentir, Ebba Henzte fekk virðisløn fyri mentanarlig avrik og Steintór Rasmussen fekk barnabókmentavirðisløn.

Talan er um fýra fólk, sum hvørt á sínum øki hava framt stór og dygdargóð avrik, sum koma at verða standandi. Carl Johan Jensen hevur endurnýggjað skaldsøguna, Gurðun Gaard hevur í tøkum tíma varpað nýtt og bjart ljós á okkara mætasta núlivandi lyrikara, Regin Dahl, Ebba Henze er inspirator, týðari og høvundur, og Steintór Rasmussen talar til hugflog barnanna.

Hesi fýra fólk, sum nevndirnar hava kosið at verða heiðrað við virðislønum, eru Tórshavnar býráð til heiðurs. Skipan við virðislønum er okkum øllum til sóma og vísir, at vit hóast nógvar atfinningar royna at stuðla og virðismeta mentanarligt og listarligt arbeiði. Landsmyndugleikar eru eisini komnir við og nú áttu tær stóru kommunurnar eisini at sett á stovn mentanar- og listavirðislønir. Hetta vildi lyft okkum øll og hetta vildi verið eitt handartak til listafólkini. At enda: hjartaliga tillukku tit fýra – tit hava heiðurin uppibornan!

**Sosialurin**

# Góðu sjúklingar, vinir og kenningar

**JENIS AV RANA**
løgtingskaður og kommunulækni



### - ein heilsan í sambandi við fjølmiðlaviðferðina seinastu tíðina

Fyri fáum vikum síðani fingu konan og eg innbjóðing úr Korea, stór samkoma har, 96.000 limir, bjóðaði okkum við til 24 ára hátíðarhald. Eg kom at kenna nøkur úr hesari samkomu í sambandi við arbeiði mítt í alheimsfelagsskapi fyri trúgvandi læknar. Vit ivaðust leingi, eitt fjarskotið og øðrvísi land, so fremmant, men endin gjørdist, at vit fóru.

Har í Korea fingu vit eina kærleiksmóttøku og viðferð, sum vit ikki droymdu um var møgulig. Vórðu borin á hondum og nutu andaligt samfelag við kær trúgvandi úr mongum, mongum londum.

### Ófrættatíðindi úr SVF

Meðan vit flugu yvir Sibiria móti Korea boðaði sjónvarpið ófrættatíðindi um læknaliga virksemi mítt, tíðindi, sum teir bóru mær gjøgnum telefonina tveir dagar áðrenn, og sum eg avsannaði.

Sum flestu vita, tók Dimmalætting tráðin uppaftur í seinastu viku, og tykist hava átikið sær leiklutin, ikki bert sum tíðindaberi, men eisini sum dømandi myndugleiki. Tað verði so teirra søk, men kenni eg tað verða rætt av mær at staðfesta, at:

- frágreiðing blaðsins um viðtalu í viðtaluhølum mínum er íspunnin.
- tagnarskyldan er ikki brotin av mær.
- fráboðanarskyldan er ikki brotin av mær.
- onnur atlit og áhugamál eru ikki tikin fram um atlitini til sjúklingar í viðtalu mínari.
- eg havi onga fráboðan fingið frá teim myndugleikum - løgreglu, heilsustýri ella landslækna - sum eg eri undirlagdur í dagliga virkisemi mínum.

Óivað er orsøkin til alt hetta ein heilt onnur- og endamálið somuleiðis.

Men eftir hetta skilja vit betur, hví Harrin unti okkum daganar í Korea.

p.s. tøkk fyri heilsanir og forbønir.

# Regin og mál-irritatión 2015

**EYÐUN MOHR VIDERØ**



Tíverri eru fá við evnum, sum duga at skriva, men sum tíma at skriva!

Millum hesi fáu telist Regin Eikholm. Hesin hevur hugsanir um ymisk mál, ið eru viðkomandi. Avgerandi fyri at tíma at lesa tílíkt valdast ikki, um ein er samdur við skrivaran, men um viðkomandi hevur eina meining um ávísa málið, og harvið kann birta undir hugan hjá øðrum at taka støðu um spurningin.

Í Dimmalætting og Sosialinum hevur hann eina grein við endamálinum: Legaliserið føroyska móðurmálið!

Sum vant í tílíkum førum, so las eg greinina, men eg sat eftir við ringum smakki í munninum, tí hóast eg ikki hevði fremmandaorðabók hjá mær fyri at skilja fleiri av orðunum, so tóktust tankarnir mær at vera ein sovorðin níðingsgerð móti føroyska málinum, at eg nærum fall í fátt!

Eg veit, at Regin er hugagóður í føroyskum dansi og kvøðari, og eg kenni hansara kenslur fyri einum føroyskum kvæði við góðum málburði. Hesin góði málburður ger kvæðið til meir enn eina hugsaða óveruliga hending, men heldur eina uppliving, har tú megnar at skipa kvæðið væl, og tað besta er, tá orðalagið situr serliga væl! Sum yndisligur tónleikur!

Nú skal allur hesin virðismikli máltónleikur sleppast fyri bakka, tí vit skulu vera við í teirri sokallaðu altjóðagerini. Hetta orð er nú vorðið eitt gandaorð fyri framburði, ið flestu ikki hava hóming um, hvat tað vil siga.

Hvat man henda altjóðagering hava at týða? Skulu vit einsrættast ímóti einum máli, so má hetta verða enskt, men tað ynskir hesin Regin ikki. Annars eru vit við í tí altjóðakenda. Vit njóta ágóðan av altjóða framburði innan vinnu, heilsu, vitan, gransking v. m.

Vit hámeta sermerkta mentan hjá lokalum menniskjum úti í stóru verð, hóast hesi ikki njóta??? okkara fíggjarliga ágóða.

Hvat væntar okkum so?

Snýr tað seg so bert um, hvat eg kann fáa av pengum úr danska statskassanum fyri at eg kann liva leingi og væl í landinum?

Eitt annað gandaorð verður nýtt í tílíkum førum í niðursetandi týdningi, og tað er nationalromantikkur!

Hvat merkir tað? Ert tað niðursetandi, at vera tjóðskaparsinnaður??? Er tað niðursetandi at vera romantiskur???

Eg skilji ikki Regin, men eg ynski heldur at vera tjóðskaparsinnaður og romantiskur við góðum føroyskum málburði, heldur enn peningagrabbi úr danska statskassanum!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.